## Keflavík søplaði sigurin burtur

Keflavík spældi á Fylkisvølli í Reykjavík ígjár. Símun Samuelsen var við allan dystin. Keflavík fekk eina rimmar byrjan. Longu í 1. minutti skoraði Guðmundur Steinarsson fyri Keflavík. Eftir 35. minuttirs spæl javnaði Ian Jeffs fyri Fylkir, men beint áðrenn steðgin legði Guðmundur Steinarsson aftur Keflavík á odda. Tá eitt lítið korter var farið av 2. hálvleiki økti Hørður Sveinsson til 3-1, og sigurin var í eygsjón hjá Keflavík. Men í 72. minutti fellir Brynjar Ørn Guðmundsson danan Allan Dyring í brotsteiginum hjá Keflavík. Guðmundsson var útvístur, og Kjartan Ágúst Breiðdal setti brotssparkið í netið til 2-3. Fylkir tók nú yvir, og stutt áðrenn leiklok javnaði sami Kjartan Ágúst Breiðdal til endaliga úrslitið 3-3. FH vann 5-2 á Akranesi, og merkir tað, at Keflavík misti oddasessin til FH. FH hevur 28 stig, Keflavík hevur 27 stig, og Valur hevur 23 stig, øll fyri 13 dystir.



## Taptu í fyrstu royndini

NM fyri U17 landslið er í Svøríki í hesum døgum. Føroyar spældi fyrsta dystin í gjár, og teir noyddust at leggja rygg til 3-0 ósigur ímóti Skotlandi. Í hálvleikinum var málleyst. Á heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum er at lesa, at føroysku dreingirnir stóðu seg væl. Teir smæddust ikki burtur í framrættaða spælinum, og millum annað bjargaðu skotar á málstrikuni, tá Andras Vágsheyg stýrdi bóltin móti málinum. Skotland var væl meira á bóltinum, og tóku av møguleikanum, tá hesir komu. Málini vórðu skotin í 53., 62. og 78. minutti.

# Pál og Kári sera væl fyri



*Pál Joensen og Kári á Høvdanum við Tasmajdan stadion í Beograd, har teir skulu kappast móti fremstu svimjarum í Evropa*

*Mynd: Jón Bjarnason*

**Eftir fyrireikingar í tveir dagar er tað nú álvara fyri Pál Joensen og Kára á Høvdanum, sum umboða Føroyar í evropameistarakapping í svimjing fyri juniorar. Svimjarar og venjarar teirra hava góðar vónir til stóru avbjóðingarnar í Beograd**

SVIMJING

*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Svimjararnir eru til reiðar, og tað sama eru venjarar teirra. Pál Joensen og Kári á Høvdanum brúktu mánadagin og týsdagin til at venja seg við hitan og umstøðurnar annars í Tašmajdan svimjistadion í Beograd, sum komandi dagarnar verður karmur um størstu avbjóðing hjá 650 av fremstu, ungu svimjarum úr 40 londum í Evropa.

– Eg havi royndt at slappa av og trappa niður frá hørðu venjingini, og annars roynt at venja meg við sólina, sigur Pál Joensen, sum síðani Danish Open fyrst í juli hevur verið á venjingarlegu í Ålborg saman við venjaranum, Jón Bjarnason.

Ungi svimjarin úr Vági letur væl at uttandura hylinum, og hann óttast ikki, at hitin í Beograd, sum liggur um 30 stig, verður ein forðan, eitt nú á langa og slítandi 1500 metra teininum.

Eisini Kári á Høvdanum, ið er ryggsvimjari, er til reiðar:

– Eg havi brúkt dagarnar her niðri til at venja meg við hylin og at svimja undir opnum himli, umframt venja meg við sterku sólina og nógva hitan. Eg var eitt sindur tungur mánadagin, men tað er komið uppá pláss nú, sigur Kári á Høvdanum.

### FAKTA

**Til EJM í Beograd svimur Pál Joensen 400 metur frí, 800 metur frí og 1500 metur frí. Kári á Høvdanum svimur 50 m rygg, 100 m rygg og 200 m rygg. Innleiðandi kappingarnar eru klokkan 08-1100. Og finalurnar eru klokkan 1600-1900, í báðum føri føroyska tíð. Rás2, Sosialurin og Portalurin eru við til EJM í Beograd. Tíðindi frá kappingini vera at frætta í øllum miðlum.**

### Vinnaramentalitetur

Jón Bjarnason er venjari í Suðurroyar Svimjifelag og Petur Heðin á Fløtti í Fuglafjarðar Svimjifelag, har ávíkavist Pál Joensen og Kári á Høvdanum venja til dagligt. Báðir eru við í Beograd, og tí ber til at siga, at ungu svimjararnir hava hvør sín landsliðsvenjara við sær til serbiska høvuðsstaðin. Felags fyri venjararnar er, at teir seta greiðar málsetningar og høg krøv til sínar svimjarar.

– Pál hevur víst góðar taktir hesar síðstu dagarnar, og hann er heldur betur fyri enn til danmarksmeistarakappingina fyrst í juli, har tað jú gekk sera væl hjá honum. So vit hava góðar vónir, sigur Jón Bjarnason.

– Kári hevur svomið nógv, bæði mánadagin og týsdagin. Hann hevur vant seg við umstøðurnar og vit eru við at vera har. Sjálvur meti eg, at hann hevur ikki verið betri fyri enn hann er nú, sigur Petur Heðin á Fløtti.

Sjálvsálitið er gott, og